**Reglugerð frá 14. september 2011 fyri nýtslu av serstakum sjúkrahúsheilivági (NBS og BEGR. heilivág)**

Við heimild í avgerð frá 11. februar 2011 hjá landsstýrismanninum í heilsumálum um stovnseting av Heilivágsráði, og eftir góðkenning frá landsstýrismanninum ásetur Heilivágsráðið hesar reglur:

**Allýsingar**
§ 1.
**NBS-heilivágur:** Heilivágur, ið bert kann útflýggjast til sjúkrahús, ella eftir ávísing frá serlækna.

**BEGR-heilivágur:** Heilivágur, ið bert kann útflýggjast til sjúkrahús.

**Tilgongdarsteðgur:** Merkir at nýggir sjúklingar, innan nærri tilskilaðan sjúklingabólk, fyribils ikki kunnu setast í viðgerð við nærri tilskilaðari tilbúning. Nýggir sjúklingar verða settir á fyribils bíðilista.

**Lutvístur tilgongdarstegður:** Merkir at einans sjúklingar, innan nærri tilskilaðar sjúklingabólk, við bráðfengis tørvi á viðgerð, kunnu setast í viðgerð við nærri tilskilaðari tilbúning. Sjúklingar sum tola at bíða uttan at tað førir til mein, verða settir á fyribils bíðilista.

**Heilivágsráðið:** Ráð sett av landsstýrismanninum í heilsumálum til at ráðgeva landsstýrismanninum og áseta leiðreglur fyri nýtsluna av serstakum sjúkrahúsheilivági í sjúkrahúsverkinum, og sum hevur eftirlit við nýtsluni av hesum heilivági.

**Ávísing**
§ 2. Allar tær í fylgiskjali 1 nevndu tilbúningar eru loyvdar læknum á føroysku sjúkrahúsunum at ávísa (ordinerað) til teir nevndu sjúkubólkar (positivlisti).
Stk. 2. Heilivágsráðið kann, eftir góðkenning frá landsstýrismanninum, seta í verk tilgongdarsteðg ella lutvístar tilgongdarsteðg fyri tilgongd av nýggjum sjúklingum til nærri tilskilaðar sjúkubólkar og tilbúningar. Møgulig slík støða er viðmerkt í fylgiskjali 1 út fyri hvørjari tilbúning til ávísan sjúkubólk, og verður harumframt kunngjørd á heimasíðuni hjá Heilivágsráðnum.

**Mannagongd**
§ 3. Áðrenn nýggir sjúklingar fáa ávíst heilivág fevndur av hesi reglugerð skal læknin í hvørjum føri kanna á heimasíðuni hjá Heilivágsráðnum, um nevndi sjúkubólkur í tí løtuni hevur rætt til ávísa heilivágin, og um møguligur tilgongdarsteðgur ella lutvísur tilgongdarsteðgur er galdandi fyri nevndu tilbúning og sjúkubólk.
Stk. 2. Einans er loyvt at ávísa heilivág fevndur av hesi reglugerð í heilivágsmótulinum í talgildu heilsuskipanini. Um hetta ikki er møguligt, skal t-postur sendast til Heilivágsráðið um viðurskiftini.

Stk. 3. Tá sjúklingur ikki longur fær ávíst heilivág fevndan av hesi reglugerð, skal læknin beinanvegin avskráseta nýtsluna í talgildu heilsuskipanini. Um hetta ikki er møguligt, skal t-postur sendast til Heilivágsráðið um viðurskiftini.

**Umbønir um broytingar**
§ 4. Um ynski er um at fáa nýggjar tilbúningar til ávísar sjúkubólkar (víðkað indikatión) við á listan, skal umbøn um tess sendast Heilivágsráðnum.
Stk. 2. Umbønin skal gerast umvegis t-post til ls@ls.fo

**Gildiskoma**
§ 5. Henda reglugerð kemur í gildi 15. september 2011 kl. 08.00. Samstundis fer úr gildi reglugerð frá 25. mai 2011, við seinni broytingum, um nýtslu av serstakum sjúkrahúsheilivági.

Heilivágsráðið hin 14. september 2011

Sigurð Ó. Vang (sign.)
formaður